HOFF STOFF

# Stormur í Sørvági og Gásadali

HOFF-STOFF
eydna@sosialurin.fo
Myndir: Jens Kr. Vang

Eftir ein baldrutan túr inn eftir Sørvágsfirði, kom kongsfamiljan í land í Sørvági. Steðgurin á bryggjuni var stuttur, tí vindurin var nógvur, hvirlurnar harðar og regnir oysti niður.

Tí varð farið beina leið til Gásadals, har tað í ein fart varð dekkað upp við ábiti í gamla skúlanum. Ætlanin var at hava tað í Mykinesi, men Mykinestúrurin varð avlýstur orsakað av ringa veðrinum.

Rasmus Niclaessen dugdi sera væl at greiða frá, og tað var týðum at láturin rungaði inni í lítla skúlanum. Síðani var farið inn í gomlu húsini í Tøðuni, áðrenn leiðin aftur gekk til Sørvágs og Sandavágs.



*Genturnar, sum skuldu handa blómurnar, blivu hampaðar, líka til landgongdin varð komin uppá pláss. Men vindurin og regnið ruskaðu hárið og klæðini til aftur so hvørt. Tær sóu tó ógvuliga fittar út, hóst alt*



*Prinsgemalurin var ikki kaldur um høvdið. Hann var nevniliga i ein um kolli frá Sirri*



*Eisini í Gásadali fingu bæði Mary og drotningin hvør sítt stóra blómutyssi frá teimum mongu, sum høvdu hættað sær út í ódnarveðrið at síggja tey kongaligu. Men Mary var ílatin eftir veðrinum, so veðrið sá ikki út til at gera henni mun*



*Mary gav sær eisini í Gásadali tíð til at heilsa upp á børnini og práta við tey eina løtu*



*Landgongd í Sørvági. Tey verða boðin vælkomin av Jákupi Suna Lauritsen*



*Eftir eina vitjan í skúlanum, har Rasmus Niclassen greiddi frá um søguna hjá húsunum í Tøðuni í Gásadali, varð farið yvir í Tøðuna, har tríggjar systrar, ættaðar úr húsinum, heilsaðu uppá. Tann elsta er 91 ár. Her síggjast drotningin og Rasmus á veg yvir í Tøðuhúsið*